# Færø Stiftamt

Eftir at Føroyar høvdu verið roknskaparlen hjá Christoffer Gabel og síðani soni hansara, Frederik Gabel, frá 1655, vóru Føroyar í 1709 lagdar undir Sjællands stift og amt. Frá 1720 til 1775 var stiftamtmaðurin fyri Ísland eisini stiftamtmaður fyri Føroyar, og frá 1775 hoyrdu Føroyar aftur undir stiftamtmannin fyri Sjælland.

Stiftamtmaðurin var umboð fyri centralstýrið í København, og her eru skriv bæði til og frá centralstýrinum og til og frá føroyskum myndugleikum.
Uppgávan hjá stiftamtmanninum var at útinna kongsins vilja og hava eftirlit við m.a.

- øllum embætismonnunum á staðnum
- at protokollir og bøkur vóru førdar rætt
- at rættargangurin gekk rætt fyri seg, og at ting vórðu hildin til tíðina og á rættan hátt
- at bæði kirkjulig og verðslig rættindi vórðu vird
- saman við biskuppi og próvsti at hava eftilit við kirkjuni og fíggjarligu viðurskiftum hennara
- fylgja handilstakstunum og at handilsmonopolið varð varðveitt
- skansanum, og at hann varð hildin við líka og hava eftirlit við starvsfólkunum, og at tey fingu løn
- at kirkja, skúli, prestar, hospital og fátøk fingu sín rætta part av jarðargjaldinum
- at leita eftir metal og mineralum og kanna hvussu tey kundu gagnnýtast
- allar supplikkir (bønaskriv), sum fólk sendu til kongin, skuldu sendast til stiftamtmannin.
- stiftamtmaðurin skuldi kanna málið og senda kongi frágreiðing um málið fyri at fáa endaligu avgerð hansara.

Stiftamtmennirnir fyri Føroyar búðu í Keypmannahavn og vóru nærum ongantíð í Føroyum. Tí vóru tað í veruleikanum embætismennirnir, ið búðu í Føroyum, sum høvdu alt beinleiðis samband við føroyingar. Orðið amt er týskt og merkir embæti. Sum frá líður fór orðið at merkja regional fyrisitingareind í tí dansk-norska kongaríkinum og tilsvarandi varð leiðarin fyri fyrisitingini kallaður amtmaður. Tó vórðu teir eisini við hvørt kallaðir ”befalingsmand”, sum er eitt eldri heiti fyri embætismann.

1720-1727 Peter Raben
1728-1730 Christian Gyldencrone
1730-1750 Heinrich Ochsen
1750-1768 Otto Mandrup Rantzau
1768-1769 Chr. Lebrecht v. Proeck
1770-1775 Laurtiz Andreas Thodal
1776-1787 Henrik Adam Brockenhuus, Stiftamtmaður fyri Sjællands Stift, Føroyar og Bornholm og amtmaður fyri Roskilde amt og Føroyar
1787-1790 Gregers Christian Haxthausen, Stiftamtmaður fyri Sjællands Stift og amtmaður fyri Føroyar
1790-1802 Johan Heinrich Knuth, Stiftamtmaður fyri Sjællands Stift og amtmaður fyri Føroyar
1802–1810 Frederik Hauch, Stiftamtmaður fyri Sjællands Stift og amtmaður fyri København og Føroyar.
1810-1816 Werner Jasper Andreas Moltke, Stiftamtmaður fyri Sjællands Stift og amtmaður fyri Føroyar
Savnindi hjá stiftamtmanninum eru skapt í Danmark, men eru komin til Føroyar skjótt eftir, at Føroyar vórðu amt. Sambart skjalayvirlitinum hjá amtmanninum í 1837 eru tey í varðveitslu har tá.

Heimildir:
Instruks fyri stiftamtmand Raben. (Stiftamtmaðurin: Protocol for Færø Litra A 1720-1721 p. 3 ff.)
P. Rosenkrantz: Amtmandsbogen, Kbh. 1936

Tjóðskjalasavnið

# Innihald

B - Kopibøger - Ordrebøger ..... 2
Ba - Ordrebøger ..... 2
Bb - Koncepter ..... 2
C - Protokol for Færø ..... 2
Ca - Protokoller 1720 - 1816 ..... 2
Cb - Protokoller ..... 3
E - Indkomne breve ..... 3
F - Skjøl úr Ísland ..... 4

| | | | |
|---|---|---|---|
| | **Færø Stiftamt** | **1646-1838** | |
| | **B - Kopibøger - Ordrebøger** | **1735 - 1838** | |
| | ***Ba - Ordrebøger***<br>*Avrit av kongaligum boðum.* | **1776 - 1816** | |
| **L0001** | Ordrebøger 1776 20/6 - 1816 22/5<br>*1 bind og 1 hefti (1 legg).* | 1776 - 1816 | HG 1 015 01/1 |
| | ***Bb - Koncepter***<br>*Kladdur til skriv* | **1735 - 1838** | |
| **L0001** | Stiftamtmandsskrivelser<br>*Gl. signatur: Collegii- og stiftskrivelser. Sum heild eru brøvini frá 1780 til 1806. Tó er eitt bræv er frá 1735, eitt annað bræv er frá 1770 eru í ímillum, og nøkur brøv eru frá 1813 til 1815 og 1838. Meginparturin av brøvunum eru stílað til løgmann, fútan ella sorinskrivaran. Talan er um brøv frá myndugleikunum í Danmark til myndugleikarnar í Føroyum.* | 1735 - 1838 | HG 1 015 01/1 |
| **L0002** | Stiftamtmandsskrivelser<br>*Gl. signatur: Collegieskrivelser (brøv frá stiftamtm.) ca. 1780-1806. Koncepter viðv. Føroyum 1803-1805 og 1807-1808. Brøv frá myndugleikunum í Føroyum til donsku myndugleikarnar.* | 1780 - 1808 | HG 1 015 01/1 |
| | **C - Protokol for Færø** | **1720 - 1816** | |
| | ***Ca - Protokoller 1720 - 1816***<br>*Protokollir við avritum av Rescripter (Kgl. resolutiónum), Collegii og øðrum útgangandi brøvum, við viðheftum yvirlitum. 3 bind.* | **1720 - 1816** | |
| **L0001** | Protokoller 1720 - 1723 | 1720 - 1723 | HG 1 015 01/1 |
| 0001 | Protokol for Færø nr. 1 - 1720 6. marts - 1721 10. juni, 1720 - 1721. Yvirlit fremst í bókini. | 1720 - 1721 | HG 1 015 01/1 |
| 0002 | Protokol for Færø nr. 2 - 1721 23. juni - 1723 5 august, 1721 - 1723. Yvirlit aftast í bókini. | 1721 - 1723 | HG 1 015 01/1 |
| **L0002** | Protokoller 1723 - 1727 | 1723 - 1727 | HG 1 015 01/1 |
| | | | |

| L-Nummar: | Innihald: | Tíðarskeið: | Staðseting |
|---|---|---|---|
| 0001 | Protokol for Færø nr. 3 - 1723 9. august - 1725 1. august, 1723 - 1725. Yvirlit aftast í bókini. | 1723 - 1725 | HG 1 015 01/1 |
| 0002 | Protokol for Færø nr. 4 - 1725 2. august - 1727 22. august, 1725 - 1727. Yvirlit aftast í bókini. | 1725 - 1727 | HG 1 015 01/1 |
| **L0003** | Protokoller 1729 - 1770 | 1729 - 1770 | HG 1 015 01/1 |
| 0002 | Protokol for Færø nr. 6 - 1756 13. februar - 1770 9. februar, 1756 - 1770. Einki yvirlit. | 1756 - 1770 | HG 1 015 01/1 |
| 0001 | Protokol for Færø nr. 5 - 1729 28. marts - 1754 11. juli, 1729 - 1754. Yvirlit síðu 61-63 yvir brøv frá 1730-1731. Aftast er yvirlit fyri árini 1747-1755. | 1729 - 1755 | HG 1 015 01/1 |
| **L0004** | Protokoller 1790 - 1816 | 1790 - 1816 | HG 1 015 01/1 |
| 0001 | Protokol for Færø nr. 7 - 1790 5. august - 1816 13. juli, 1790 - 1816. Einki yvirlit. | 1790 - 1816 | HG 1 015 01/1 |
| | ***Cb - Protokoller***<br>*Protokollir við avritum av útgangandi brøvum. 3 bind og 3 heftir.* | **1771 - 1790** | |
| **L0003** | Copie af de Breve som sendes til Collegierne Ferøe vedkommende<br>*1771 2. februar - 1773 14. juli 1773 16. august - 1782 30. november 1783 8. februar - 1790 31. mei Einki yvirlit.. 3 heftir.* | 1771 - 1790 | HG 1 015 01/1 |
| | **E - Indkomne breve**<br>*Eisini eru brøv, ið eru skrivaði til kongs. Fyri nøkur ár eru yvirlit yvir tey ymsu brøvini.* | **1718 - 1806** | |
| **L0001** | Indkomne Breve til Stiftbefalingsmanden 1718-1721<br>*M.a. bræv viðv. Peder Araboe 10/9-1718, og frá Bente Christine (Beinta) 31/8-1720. Eisini er eitt hosumát í einum brævi (1721 no. 15).* | 1718 - 1721 | HG 1 015 01/1 |
| **L0002** | Indkomne Breve til Stiftbefalingsmanden 1721-1723<br>*1 legg.* | 1721 - 1723 | HG 1 015 01/1 |
| **L0003** | Indkomne Breve til Stiftbefalingsmanden 1722-1725 | 1722 - 1725 | HG 1 015 01/1 |
| **L0004** | Indkomne Breve til Stiftbefalingsmanden 1726-1731 | 1726 - 1731 | HG 1 015 01/1 |
| **L0005** | Indkomne Breve til Stiftbefalingsmanden 1732-1742 | 1732 - 1742 | HG 1 015 01/1 |
| **L0006** | Indkomne Breve til Stiftbefalingsmanden 1743-1756 | 1743 - 1756 | HG 1 015 01/2 |

| L-Nummar: | Innihald: | Tíðarskeið: | Staðseting |
|---|---|---|---|
| | | | |
| **L0007** | Indkomne Breve til Stiftbefalingsmanden 1757-1768 | 1757 - 1768 | HG 1 015 01/2 |
| **L0008** | Indkomne Breve til Stiftbefalingsmanden 1768-1781<br>*Í hesari eskju er eisini 1 legg við "Tyendeloven af 1777".* | 1768 - 1781 | HG 1 015 01/2 |
| **L0009** | Indkomne Breve til Stiftbefalingsmanden 1782-1790<br>*M.a. eisini viðv. "Brandtaxation" 1784.* | 1782 - 1797 | HG 1 015 01/2 |
| **L0010** | Breve Færøerne vedkommende til stiftamtmanden 1800-1805 | 1800 - 1805 | HG 1 015 01/2 |
| | **F - Skjøl úr Ísland**<br>*Meginparturin av skjølunum eru frá 1720 til 1775 , tá ið Føroyar hoyrdu undir stiftamtmannin fyri Ísland. Skjølini hava ligið í Íslandi og eru komin til Føroyar í 1980.* | **1646 - 1782** | |
| **L0001** | Skjøl frá stiftamtmanninum fyri Ísland | 1646 - 1782 | HG 1 016 04/3 |
| 0001 | Frágreiðing um kongaliga handilin við árslok 1733, dagfest 30. jan. 1734 | 1734 | HG 1 016 04/3 |
| 0002 | Rentukamarbræv til Oksen, stiftamtmann, at Peder Ramshard, keypmaður, eigur at síggja vørurnar áðrenn føroyingar fáa tær. Dagfesting 17. febr. 1731. – Eisini tvey fylgiskjøl | 1731 | HG 1 016 04/3 |
| 0003 | Rentukamarbræv til Oksen, stiftamtmann, um at Isacs Olsen, skipari, skal flyta fangan Hans Lucasson úr Føroyum til Keypmannahavnar, dagfest 15. juni 1735 | 1735 | HG 1 016 04/3 |
| 0004 | Rokningar hjá 5 kirkjum í Vágoy í Føroyum í tíðarskeiðnum 1709-1720 | 1709 - 1720 | HG 1 016 04/3 |
| 0005 | Rokningar hjá 7 kirkjum í Norðoyggjum í Føroyum fyri tíðarskeiðið 1709-1720 | 1709 - 1720 | HG 1 016 04/3 |
| 0006 | Rokningar hjá 6 kirkjum í Suðuroy fyri tíðarskeiðið 1709-1720 | 1709 - 1720 | HG 1 016 04/3 |
| 0007 | Rokningar hjá 4 kirkjum í Sandoy í Føroyum fyri tíðarskeiðið 1709-1720 | 1709 - 1720 | HG 1 016 04/3 |
| 0008 | Kirkjuroknskapur frá Føroyum 1719 | 1719 | HG 1 016 04/3 |
| 0009 | Kirkjurokningar úr Føroyum 1734 | 1734 | HG 1 016 04/3 |
| 0010 | Kirkjuroknskapur frá Føroyum 1722 | 1720 | HG 1 016 04/3 |

| L-Nummar: | Innihald: | Tíðarskeið: | Staðseting |
|---|---|---|---|
| 0011 | Avrit av kongabrøvum viðvíkjandi Føroyum og ymisk skjøl um kirkjur í Føroyum, hospitalsskjøl v.m. Nógv skjøl eru frá umleið 1730, men nøkur nógv eldri | 1730 | HG 1 016 04/3 |
| 0012 | Skjøl um Føroyar 1646 – 1735<br><br>*Her er eisini tekning av Tórshavn frá 1782 av óvissum uppruna* | 1646 - 1735 | HG 1 016 04/3 |
| 0013 | Tekning av Tórshavn eftir L.U. Born, dagfest 31. jan. 1782. -<br><br>*Ókendur uppruni* | 1782 | HG 1 016 04/3 |
| 0014 | Frágreiðing um skúla og skúlamál í Føroyum, dagfest 24. juni 1646. - Avrit<br><br>*– Váttað avrit frá 5. august 1719* | 1646 | HG 1 016 04/3 |
| 0015 | Frágreiðing um skúlan í Tórshavn, næmingar, stuðul og kongabræv, dagfest 23. mai 1729 | 1729 | HG 1 016 04/3 |
| 0016 | Rentukamarbræv til Oksen, stiftamtmann, um umvæling av løgtingshúsunum í Føroyum, dagfest 9. juli 1735. – Við fylgir avrit av brævi frá Rentukamarinum til Jørgen Frantz Hammershaimb um sama mál, dagfest sama dag. | 1735 | HG 1 016 04/3 |
| 0017 | Rentukamarbræv til Oksen, stiftamtmann, um levering av longum og stuttum hosum í Føroyum, dagfest 19. febr. 1735. – Við fylgir avrit af rentukamarbrævi til løgmannin, fútan og keypmannin í Føroyum um sama evni, dagfest sama dag | 1735 | HG 1 016 04/3 |
| 0018 | Rentukamarbræv til Oksen, stiftamtmann, um veitingarnar til Føroyar, dagfest 8. jan. 1735. – Við fylgir avrit af Rentukamarbrævi til commerceraad Brumund um málið, dagf. sama dag | 1735 | HG 1 016 04/3 |
| 0019 | Notatir viðvíkjandi Føroyum, tvey skjøl heft saman, hvørki undirskrivað, men annað er dagfest 3. sept. 1720 | 1720 | HG 1 016 04/3 |
| 0020 | Bræv frá Tórshavn í Føroyum um eftirlit við mál og vekt, ikki undirskrivað, men dagfest 30. sept. (?) 1730. – Við fylgir skjal undirskrivað av S. Pedersen (løgmanni) og Schougaard (sorinskrivara) | 1730 | HG 1 016 04/3 |
| 0021 | Skrá yvir føroysk skjøl og brøv í tíðarskeiðnum 1709-1728, dagfest 12. des. 1730 og undirskrivað av Gyldencrone stiftamtmanni | 1709 - 1728 | HG 1 016 04/3 |
| 0022 | Skúlarokningar frá Tórshavn í Føroyum 1691-1696, undirskrivaðar av Jacob Christiansen. Váttað avrit frá 18. august 1719 | 1691 - 1696 | HG 1 016 04/3 |